KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 14.12.2017 kl. 17:30
**Málnr.:** 16/01208 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Kjartan á Gravarbø, Tummas J. Lervig, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen.

Varalimir:
Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 130/17 | 17/01389-1 | Áseting av fundardøgum 2018 – Klaksvíkar býráð v.m. |
| 131/17 | 16/00054-24 | Umhvørvis- og orkupolitikkur - Klaksvíkar kommuna |
| 132/17 | 17/01397-1 | Dagføring og tillagan av Serstakari Byggisamtykt fyri miðbýarøkið |
| 133/17 | 15/00135-44 | Íløgustuðul til Spinnaríið. Treytað tilsøgn, ískoyti |
| 134/17 | 11/00134-53 | Mentanarhúsið í Klaksvík, stuðulsjáttan 2017 – *flyting millum kontur, seinna viðgerð* |
| 135/17 | 17/00078-8 | Fíggjarætlan 2017; mentanarøkið – *eykajáttan, seinna viðgerð* |

**Til viðgerðar**

## 130/17
## 17/01389-1 Áseting av fundardøgum 2018 – Klaksvíkar býráð v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 14.12.2017 | 130/17 | |

**Frágreiðing um málið:**
Býráðið skal við ársbyrjan almannakunngera, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir. Á seinasta býráðsfundinum í árinum avger býráðið vanliga, nær fundirnir fyri komandi árið skulu haldast.

Hesir fundardagar eru í uppskoti til býráðsfundirnar í 2018:

| | |
|---|---|
| 25. januar | 21. juni |
| 22. februar | 30. august |
| 22. mars | 27. september |
| 26. apríl | 31. oktober |
| 24. mai | 22. november |

Fundir Klaksvíkar býráðs verða vanliga hildnir í býráðshøllini - Nólsoyar Páls gøta 32, Klaksvík.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin:
***§ 13.*** *Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. ... Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.*

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til uppskotnu fundardagarnar.

**Býráðsins samtykt 14-12-2017**
Einmælt samtykt at taka undir við uppskotnu fundardøgunum fyri 2018.

## 131/17
## 16/00054-24 Umhvørvis- og orkupolitikkur - Klaksvíkar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 04.12.2017 | 100/17 | |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 04.12.2017 | 49/17 | |
| 3 Mentanarnevndin | 05.12.2017 | 70/17 | |
| 4 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 05.12.2017 | 57/17 | |
| 5 Tekniska Nevnd | 06.12.2017 | 65/17 | |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 14.12.2017 | 131/17 | |

**Frágreiðing um málið:**
UBN samtykti 18. januar 2016 at gera eitt uppskot til umhvørvis- og orkupolitikk hjá Klaksvíkar kommunu. Uppskotið bleiv gjørt, og formaðurin í UBN heitti á umsitingina um at leggja uppskotið um

umhvørvis- og orkupolitikkin hjá Klaksvíkar kommunu til viðmerkingar á heimsasíðuni. Freistin fyri at gera viðmerkingar var 9. oktober 2017, og inn komu 5 viðmerkingar, sum síðani vórðu lagdar fyri avvarðandi nevnd 11. oktober 2017. Nevndin "tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og tekur undir við "orkupolitikkinum".

Umhvørvis- og orkupolitikkurin verður hervið lagdur fyri avvarðandi nevndir og býráð til endaliga samtykt.

**Lógargrundarlag:**
Umhvørvis- og orkupolitikkur

**Tilmæli:**
Tilmælið verður hervið lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til støðutakan.

**UBN 04-12-2017**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest tann 23-11-2017.

**HaVN 04-12-2017**
Nevndin tekur undir við UBN 04-12-2017.

**MeN 05-12-2017**
Nevndin tekur undir við UBN 04-12-2017 og HaVN 04-12-2017 og heitir á umsitingina um at vísa á broytingarnar í orkupolitikkinum til býráðsfundin 14-12-2017.

**TrN B&U 05-12-2017**
Nevndin tekur undir við MeN 05-12-2017.

**TN 06-12-2017**
Nevndin tekur undir við viðtøkunum hjá UBN og HaVN 04-12-2017 og MeN og TrN B&U 05-12-2017.

**Býráðsins samtykt 14-12-2017**
Tilmælið, dagf. 23-11-2017, einmælt samtykt, og umhvørvis- og orkupolitikkur kommununnar endaliga samtyktur.

## 132/17
## 17/01397-1 Dagføring og tillagan av Serstakari Byggisamtykt fyri miðbýarøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 04.12.2017 | 97/17 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 14.12.2017 | 132/17 | |

**Frágreiðing um málið:**
18. mars 2014 góðkendi Fiskimálaráðið Serstaku Byggisamtyktina fyri miðbýarøkið í Klaksvík. Góðkenningin umfatar alt økið – undantikið íbúðarbyggingina vestan fyri Vágsá. Kommunan tók avmarkaðu góðkenningina til eftirtektar. (mál 1200793).

9. juli 2015 samtykti býráðið skipanaruppskot fyri miðbýin. (mál 13/01072).
Skipanaruppskotið leggur m.a. upp til at nýta lendið vestanfyri Vágsá til parkeringshús. (sí skjal III)

Niðanfyri er víst støðumynd av samtykta skipanaruppskotinum, har eisini byggifeltini í Serstøku Byggisamtyktini eru punkterað inn á við reyðum. (skipanaruppskot og byggisamtyktarkort er viðheft sum skjal I og II)




**Lógargrundarlag:**
Býarskipanarlógin

**Tilmæli:**
Mælt verður til at fara undir tilgongdina við

- víðkan av Serstøku Byggisamtyktini fyri miðbýin til eisini at umfata økið vestanfyri Vágsá til parkeringshús. Hædd og treytir annars verða orðað í samráð við miðbýararkitektin
- at tillaga byggifeltini í Serstøku Byggisamtyktina í mun til samtykta skipanaruppskotið

**UBN 04-12-2017**
Tikið verður undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest tann 20-11-2017

**Býráðsins samtykt 14-12-2017**
Tilmælið frá UBN 04-12-2017 einmælt samtykt.

## 133/17
## 15/00135-44 Íløgustuðul til Spinnaríið. Treytað tilsøgn, ískoyti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 136/17 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 14.12.2017 | 133/17 | |

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi dagfest 16. apríl 2016 sendi grunnurin Spinnaríið umsókn til Klaksvíkar kommunu um stuðul til umbygging av Spinnarínum. Søkt varð um 2,5 mió. kr. í meirjáttan ella tilsamans 4,5 mió. kr. í alt.

Mentanarnevndin, Fíggjarnevndin og Klaksvíkar Býráð viðgjørdu í apríl 2016 umsóknina og samtyktu fylgjandi tilsøgn:

*Klaksvíkar kommuna er sinnað at hækka árliga rakstrarstuðulin til kr. 300.000,- og veita ein íløgustuðul á 3 mió. kr. til liðuggerð av verandi bygningi.*

Til tilsøgnina eru knýttar treytir, og er ein av hesum, "Tilsøgnin gongur út um tvey ár frá dagfestingini av hesum brævi. Um verkætlanin ikki er liðug um tvey ár, fellur tilsøgnin burtur."

Dagfestingin var 29. apríl 2016.

Grunnurin Spinnaríið hevur fingið endurskoðaða tíðarætlan fyri endurbyggingina av Spinnarínum, sum er dagfest 15. november 2017, sí viðfestu høvuðstíðarætlan.

Sambært hesi tíðarætlan verður endurbyggingin liðug ultimo apríl 2018.

Við støði í tí veruleika, at tíðarætlanin er dagførd nakrar ferðir, vil Grunnurin Spinnaríið við hesum heita á Klaksvíkar kommunu um at longja tíðarfreistina fyri tilsøgnina við einum hálvum ári.

Av tí at talan er um sera álvarsligar avleiðingar, um tilsøgnin ikki verður longd, ynskir Grunnurin Spinnaríið at fáa svar frá Klaksvíkar kommunu, so skjótt sum til ber.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at ganga umsóknini frá Grunninum Spinnarínum á møti, og at tilsøgnin er galdandi árið (2018) út.

**FíN 12-12-2017**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-12-2017.

**Býráðsins samtykt 14-12-2017**
Tilmælið frá FíN 12-12-2017 einmælt samtykt.

## 134/17
## 11/00134-53 Mentanarhúsið í Klaksvík, stuðulsjáttan 2017 – *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.11.2017 | 134/17 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 16.11.2017 | 123/17 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 14.12.2017 | 134/17 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 16. november 2017.

**FíN 14-11-2017**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-11-2017.

**Býráðsins samtykt 16-11-2017**
Tilmælið frá FíN 14-11-2017 einmælt samtykt; útgjaldið fyri 2018 skal leggjast fyri býráðið, áðrenn tað verður goldið út.

**Býráðsins samtykt 14-12-2017**
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 135/17
## 17/00078-8 Fíggjarætlan 2017; mentanarøkið – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.11.2017 | 66/17 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.11.2017 | 132/17 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 16.11.2017 | 124/17 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 14.12.2017 | 135/17 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 16. november 2017.

**MeN 07-11-2017**
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Atli S. Justinussen og Óli M. Lassen, tekur undir við tilmæli 31-10-2017 frá umsitingini, og vísir á, at ítøkilig játtan til hvørt einstakt mál má framganga í tilmælinum framyvir.
Ein minnniluti, Gunvá við Keldu, mælir til at halda játtanina og gera sparingar í rakstrinum í grein 5.

**FíN 14-11-2017**
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Beinta Klakstein, tekur undir við meirilutanum í MeN 07-11-2017.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu, tekur undir við minnilutanum í MeN 07-11-2017.
Herfrí J. Sørensen tekur støðu í býráðnum.

**Býráðsins samtykt 16-11-2017**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í MeN 07-11-2017 og FíN 14-11-2017; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kjartan á Gravarbø, Beinta Klakstein, Tummas J. Lervig, Óli M. Lassen og Atli S. Justinussen) og 3 ímóti (Gunvá við Keldu, Beinir Johannesen og Steinbjørn O. Jacobsen) og einari blankari atkvøðu (Herfrí J. Sørensen).

**Býráðsins samtykt 14-12-2017**

Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá BýR 16-11-2017; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kjartan á Gravarbø, Kristian Eli Zachariasen, Tummas J. Lervig, Óli M. Lassen og Atli S. Justinussen) og 3 ímóti (Gunvá við Keldu, Beinir Johannesen og Steinbjørn O. Jacobsen) og einari blankari atkvøðu (Herfrí J. Sørensen).